# Viðgerð av persónsupplýsingum

Her verður kunnað um, hvussu persónupplýsingar verða nýttar í sambandi við, at tú hevur teknað teg til tiltak í Vinnuhúsinum og tygara rættur í hesum sambandi.

## 1. Dátuábyrgdari

Føroya Arbeiðsgevarafelag er dátuábyrgdari fyri viðgerð av persónsupplýsingum í sambandi við tilmeldingar til tiltøk í Vinnuhúsinum.

Tú kanst seta teg í samband við Vinnuhúsið soleiðis:

**Vinnuhúsið**
Óðinshædd 7
100 Tórshavn
Føroyar
+298 30 99 00
industry@industry.fo

## 2. Endamálið við viðgerðini av persónupplýsingum

Endamálið við viðgerðini av persónupplýsingum í sambandi við tilmelding til tiltøk í Vinnuhúsinum er at gera tað møguligt skipa tiltakið á nøktandi hátt.

## 3. Hvørjar persónupplýsingar viðgera feløgini í Vinnuhúsinum

Tá teknað verður til tiltak í Vinnuhúsinum, verður samstundis givið okkum rætt at viðgera persónsupplýsingar, sum eru viðkomandi fyri tilmeldingina. Við teimum vissa vit okkum um, at vit kunnu seta okkum í samband við rætta viðkomandi um broytingar eru í skránni, skriva faktura og at gera navnaspjaldur. Hetta er neyðugt fyri at vit kunnu skipa tiltakið.

Hesar persónsupplýsingar skráseta vit:

- Navn
- Navn á Fyritøku
- Bústað hjá fyritøku
- Teldupostadressa
- Fartelefonnummar

Tá teknað verður til tiltak í Vinnuhúsinum, gevur tú samtykki til, at Vinnuhúsið kann:

- Skráseta navn, telefonnr. og teldupostadressu

## 4. Hvussu leingi goymir Vinnuhúsið persónupplýsingarnar

Eftir at tiltakið er endað, verða persónupplýsingarnar goymdir í ein mánað. Tá verða upplýsingarnarn strikaðar.

## 5. Rættindi

Ein og hvør hevur sambært galdandi lóggávu ymisk rættindi í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

Set teg í samband við Vinnuhúsið, um tú ynskir at brúka tíni rættindi. Hetta kann t.d. vera:

- Hvørjar persónupplýsingar verða viðgjørdar
- At rætta skeivar upplýsingar
- Í ávísum førum kanst tú fáa tínar persónupplýsingar strikaðar innan freistina ásett í pkt. 4 omanfyri.

Til ber at kunna seg nærri um rættindi sambært persónupplýsingarlóggávuni á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, www.dat.fo.

## 6. Klagur

Til ber at klaga til Dátueftirlitið um viðgerð av persónupplýsingum. Sí heimasíðuna www.dat.fo.